

# Leys størv

**Starvsfólk til Dagstovnin á Velbastað**

Vit fáa nýggjan og størri dagstovn á Velbastað í august í ár, tí hava vit brúk fyri nøkrum starvsfólkum afturat.

Á stovninum koma at ganga eini 60-70 børn í aldrinum frá hálvum til otta ár. Vit koma at hava brúk fyri starvsfólkum, sum hava hug og árræði at arbeiða saman við okkum og børnunum.

Ert tú pedagogur og hevur hug at royna nakað nýtt og spennandi, so hava vit 4 leys størv bæði í vøggustovubólki, barnagarðsbólki og frítíðarskúlabólki.

Løn og setanarviðurskifti annars verða samb. sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Møguleiki er fyri at fáa arbeiðstíð uppá 40, 35, 30 ella 20 tímar um vikuna. Vit koma at seta arbeiðstíðirnar fyrst eftir tørvinum hjá stovninum og síðani eftir ynskjunum hjá starvsfólkunum. Vit koma eisini at hava brúk fyri tveimum hálvtíðarfólkum við fastari arbeiðstíð frá kl. 13.00 til 17.00. Hinar arbeiðstíðirnar verða skiftandi eftir tørvi hjá teimum ymisku bólkunum á stovninum.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í starv.

Hevur tú áhuga, so søk ella tosa við okkum.

Nýggi stovnurin kemur at hava stóra høll og egnan bóltvøll og liggur beint við hagan uppi yvir Velbastað. Tí hava vit brúk fyri fólki, sum hava áhuga fyri at gera nakað við tónleik, sang, sjónleik, ítrótt og at brúka náttúruna.

Meira fæst at vita um størvini við at tosa við Bjarna Clementsen, leiðara á telefon 218132.

Umsóknir skulu vera stovninum í hendi seinast 5. juli 2006.

Dagstovnurin á Velbastað
Undir Borgarhálsi 44
FO-176 Velbastaður

**Les meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Hygieinusjúkrarøktar-frøðingur

Eitt nýtt starv sum hygieinusjúkrarøktarfrøðingur í Føroyum er leyst at søkja til setan 1. september 2006 ella eftir avtalu.

Starvið verður sett á Landssjúkrahúsinum við tilvísing til sjúkrahúsleiðsluna.

**Ábyrgdarøki:**
Hygieinusjúkrarøktarfrøðingurin hevur í samstarvi við leiðslurnar í heilsuverkinum, landslæknanum og konsulentinum í mikrobiologi ábyrgdina av, at smittuhygieiniska funktiónin í Føroyum mennist og verður røkt sambært galdandi lógum, standardum og leiðreglum. Harumframt skal hygieinusjúkrarøktarfrøðingurin menna og samskipa smittuhygieiniska arbeiðið m.a viðvíkjandi MRSA.

**Uppgávur:**
- At menna og samskipa smittuhygieinisku funktiónina
- At smittuhygieinan er grundað á tær til eina og hvørja tíð galdandi lógir, fyriskipanir og leiðreglur
- At ráðgeva leiðslunum innan heilsuverkið í øllum viðurskiftum viðvíkjandi smittuhygieinu
- At tað finnast dagførdar leiðreglur innan smittuhygieiniska økið
- At lýsa aktuellu støðuna viðvíkjandi smittuhygieinum í einari deild ella øki
- At kunna relevantum leiðslum um virksemi, sum er í gongd
- At tað í samband við ráðgeving í innkeypi og brúki av vørum til kanning, viðgerð og røkt verður tikið fyrilit fyri innkeypspolitikkinum á stovninum
- Onnur ráðgeving, frálæra og góðskueftirlit

Útyvir hetta kemur nýggi hygieinusjúkrarøktarfrøðingurin at verða við í smittuhygieinisku uppgávunum, sum í dag verða røktar av konsulentunum í mikrobiologi og hygieinu, í samstarvi við hygieinunevndirnar á sjúkrahúsunum í Føroyum.

**Vit vænta, at umsøkjarin hevur:**
- Autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Breiðar fakligar royndir innan sjúkrarøkt
- Víðariútbúgving innan sjúkrarøkt
- Serútbúgving í smittuhygieinu fyri sjúkrarøktarfrøðingar ella skal luttaka á fyrsta útbúgvingarskeiðið (2007)
- Hevur royndir við projektarbeiði
- Hevur arbeitt við góðskumenning og kann seta seg inn í granskingarúrslit
- Hevur góðan málførleika á føroyskum, donskum og enskum
- Hevur royndir og áhuga í KT
- Hevur góð evni at læra frá sær og royndir í hesum
- Hevur góð evni at orða seg og góð samstarvsevni
- Hevur árææi og er førur fyri at klára nógvar arbeiðsuppgávur samstundis
- Hevur evni til at loysa truplar arbeiðsuppgávur
- Er fúsur til at luttaka á fakligum fundum, kongressum v.m. í Føroyum og uttanlands.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt tætt samstarv við mikrobiologisku eindina á Rannsóknarstovuni
- Spennandi og skiftandi arbeiðsuppgávur á nógvum stigum
- Sjálvstøðuga fyrireiking av egnum arbeiðsuppgávum
- Eitt sjálvstøðugt arbeiðsøki í menning
- Eitt arbeiðsøki við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið. Tá talan er um nýtt starv, skulu samráðingar um flokking fara fram millum sáttmálapartarnar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, telefon 30 45 00, lokal 1003, teldupostur marinv@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 14. juli 2006 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn





**Útferðir í Norðoyum:**
Frá Hvannasundi og norður um Enniberg, ella runt Fugloy ella Svínoy.
Eisini beinleiðis til Svínoy og Fugloy eftir avtalu.
Vit eru til taks alt døgnið.
Ring: m/b. Alpha Pilot
telefon 22 08 49

